

# Føroyar mítt land

Hjá teimum, sum kanska hvørki eru morgun- ella kvøldfólk, verður nú høvi til at hoyra tær sendingarnar í røðini »Føroyar mítt land«, sum hava verið sendar í vikuni. Tað verður í einari sending á Rás2 sunnudag klokkan 13, fyrstu ferð nú sunnudagin. Umrøðuevnini hesa vikuna hava verið: motorbátar í Klaksvík; yrkjarin, presturin og politikarin Fríðrikur Petersen; føroyski tjóðbúnin – hesa ferð um tumlahandskar og silvurið til kvinnubúnan; plantur til matna, lækningar, litgerðar og ídnaðar; og nú flaggdagur var fríggjadagin, eisini nakrar hugleiðingar um Merkið. Tey, sum løgdu sendingarnar til rættis hesa vikuna, vóru Marius Rein, Hanus Kamban, Nicolina Jensen Beder, Janus Mohr og Helena Samuelsen.

**Føroyar mítt land í næstu viku:**

28/4 Marius Rein
29/4 Janus Mohr
30/4 Nicolina Jensen Beder
1/5 Kristi himmalferðardagur, tí eingin sending
2/5 A. Guttormur Djurhuus

Hvønn gerandisdag kl. 8, kl. 9, kl. 22 og kl. 23, (týsdag tó 22.30)


inni - trygt og ómaksleyst til hús



**Íbúð – Jónas Broncksgøta 19-4, Tórshavn**
Íbúðin er í einari hædd á 48 fermetrar + 4 fermetrar hjallur / goymslurúm. Har er inngongd, durur / gongd, baðirúm, kamar og køkur / borðsstova / stova. Hartitl er hjallur og goymslurúm. Íbúðin liggur sera væl fyri í veðurgóðum og eldravinaligum umhvørvi mitt í býnum, har stutt er til alt.
**Prísuppskot : 1.200.000,00**



**Sethús – Undir Klakki 39, Klaksvík**
Húsini eru í 3 hæddum – samlað búvídd uml. 180 fermetrar og ein kjallari við garagu á 60 fermetrar. Grundøkið er 507 fermetrar. Byggiár er 1987. Húsini eru betong upp til vindeygahædd, restin er timbur, hava plastikkvindeygu og aluminiumstak. Í ovastu hædd eru 3 kømur, 1 hjúnarrúm og wc. Í miðhæddini er durur, gongd, trappuuppgongd, baðirúm, køkur, brúggers/vaskirúm og vinkul-stova. Í niðastu hædd er innbygd garaga og fýrrúm/kjallararúm.
**Prísuppskot : 1.200.000,00**

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01